STUTT SAGT

# Kórkonsert í Vesturkirkjuni við Vox academica og Tarira



*Vox academia er eitt íslendskt elitukór*

**Vesturkirkjan verður sunnudagin kl 16:00 karmur um kamarkórtónleik av allar besta slagi, tá íslendska kórið Vox academica og føroyska Tarira fara at syngja, her er talan um nakað av í besta innan norðurlenskan kórtónleik á somu konsert**

KÓRTÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Íslendska kamarkórið Vox academica hevur 10 ára starvsdag í ár og hetta verður m.a. hildið við at vitja 22 sangfelagar í Føroyum. Vox academica var av fyrstan tíð mannað við fyrrverandi limum úr Háskólakórinum í Reykjavík, men í dag eru limirnir ymsa staðni frá, øll royndir kórsangarar við ávísari tónleikaútbúgving.

Aftrat tí íslendska Vox academica syngur eisini tað væl umtókta og altíð frálíka kamarkórið Tarira henda dagin í Vesturkirkjuni. Tarira fer at syngja kendar norðurlendskar sangir, herundir eisini nýggjari føroyskar sangir.

Á skránni hjá Vox academica verða gomul og nýggj íslendsk løg, m.a. verk eftir Leif Þórarinsson, Atla Heimi Sveinsson, Hróðmar Inga Sigurbjörnsson, Jón Leifs, Victor Urbancic og Báru Grímsdóttur. Vox academica verður stjórnað av Hákoni Leifssyni, ið eisini er kórleiðari hjá Háskólakórinum í Reykjavík og organistur og kórleiðari hjá kirkjukórinum í Keflavík.

Skráin hjá Vox academica hevur frá fyrstan tíð verið sera fjølbroytt og krevjandi. Kórið hevur sungið fleiri íslendsk nútíðarverk og haraftrat klassisk kórverk bæði íslendsk og útlendsk. Summi av hesum verkum hava verið skrivað serliga til kórið, og á teimum "Myrku musikkdøgunum", ið hildnir vóru í februarmánaði í ár, fekk kórið serliga góð ummæli fyri m..a. tær tríggjar frumframførslurnar, ið vóru skrivaðar serstaklega til Vox academica. Seint í apríl sang kórið Requiem hjá Mozart saman við Jón Leifs Camerata, ið er mannað av tónleikarum úr íslendska symfoniorkestrinum, og eisini hesa ferð var skoðsmálið sera gott.

Vox academica hevur haraftrat sungið eitt nú Requiem Faurés, Carmina burana hjá Orff og Gloriu hjá Vivaldi, umframt fleiri stór nútíðarverk sum Lincoln Mass hjá Úlfari Inga Haraldssyni, African Sanctus hjá David Fanshawe og Hjörturinn skiptir um dvalarstað hjá Hróðmari Inga Sigurbjörnssyni, ið kórið sang inn á fløgu í 2003 saman við Sigrúnu Hjálmtýsdóttur (Diddú) operusangara og Rússíbananna. Fløgan varð vald sum umboð í kappingini um ta íslendsku tónleikavirðislønina 2003. Á heysti 2005 kom aftur ein fløga við Vox academica, hesuferð við advents- og jólaløgum.

Framførslan í Vesturkirkjuni er kl 16:00. Ókeypis atgongd.



*Outlandish eru eitt tað størsta danska poppnavnið í løtuni*

Outlandish á G!:

# Politiskur poppur í heimflokki

**"Okkum dámar væl at yvirraska fólk", sigur Jón Tyril, um avgerðina at taka eitt tað størsta danska poppnavnið í løtuni við á skránna fyri G! Festivalin, nú fjølmentaði hip-hop bólkurin Outlandish fer á pallin á Gøtusandi**

FESTIVAL SUMMARIÐ
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tað var ein sera vælnøgdur Jón Tyril, ið vit fingu fatur á í telefonini, nú tað gjørdist greitt, at Outlandish spælir á G! Festivalinum. Hann hevur tvær ferðir upplivað Outlandish á konsert, og báðu ferðina hevur honum dámt bólkin sera væl, tí er hann eisini sera fegin at kunna bjóða føroyingum enn eina góða tónleika upplivilng. Hetta, at bólkurin er ein góð tónleikaupplivilng, er nokk høvuðsorsøkin til, at Outlandish er komin á skránna fyri G!.

## Dáma at yvirraska

Jón sigur somuleiðis, at festivalurin ofta verður settur í samband við eitt sindur tyngrið tónleik enn hetta, ivaleyst orsaka av tónlistarligu bakgrundini hjá fyriskiparunum, og upprunaliga tilknýtið til Grót, ið vanliga skipar fyri smáum rokkkonsertum í Losjuni.

Men soleiðis er ikki í veruleikanum. Fyriskiparararnir vilja fegin broyta hesa ímyndina, greiðir Jón frá "Okkum hevur øll árini dámt, at yvirraska fólk. T.d. vóru nóg yvirraskaði av, at Bumfunk MC's spældi, og eisini fleiri av at Europe spældi, summi vóru eisini yvirraskaði yvir, at Kashmir spældi - Tí tey tá ikki hildu, at danskir bólkar sluppu at spæla á G!", sigur Jón. Tað er heldur eingin ivi um, at nógv nú eru tikin av bóli av, at Outlandish er á skránni í ár. Men hetta er ein staðfesting av, at G! Festivalurin hevur einki ímóti popp tónleiki.

## Sterkar politiskar viðmerkingar

Búsitandi í Danmark, men við uppruna í Honduras, Marokko og Pakistan, er Outlandish ein sera fjølmentaður bólkur, ið samstundis er ein tann størsti danski tónlistarligi útflutningurin seinnu árini. Men hetta er samstundis ein bólkur, ið veruliga hevur nógv á hjartanum. Tekstirnir eru sterkir og finnast hvassliga at óretti. Hetta var so á fløguni Bread And Barrels Of Water, men gjørdist uppaftur týðiligari á nýggjastu fløguni Closer Than Veins. Outlandish er ein sterkt politiskur bólkur, ið ikki finnir seg í at fólk vera viðfarin illa. Stutt sagt er hetta tónleikur við meiningum. Nakað, sum Jón Tyril eisini heldur vera sera jaligt, "Tað er altíð stuttligt at uppliva fólk, ið veruliga meina okkurt og brúka tað í sínum tónleiki", sigur Jón.

## Størsti danski hip hop bólkur

Hóast sjálvur tónleikurin er fangandi poppur, so eru so nógv ymisk rák og íblástur at hoyra í tónleikinum, at tú ongantíð er í iva um, at tú lurtar eftir Outlandish, Hetta er eitt slag av heimstónleiki, blandað við hip hoppi og r'n'b. Bólkurin hevur skapt eitt sterkt og egið ljóð. ið hevur vunnið bólkinum nógvar fjepparir. Við hitfløgum sum Guantanamo, Aicha, Walou, Man binder os på mund og hånd og Look Into My Eyes, hevur Outlandish rakt nógv breiðari á danska marknaðinum, enn nakar annar hip hop bólkur hevur gjørt áður.

## Røkka út um heimamarknaðin

Fløgan 'Bread And Barrels Of Water' hevur rokkið langt út um danska kongaríkið, og bólkurin hevur selt gyltar fløgur í Týsklandi, Eysturríki, Sveis, Svøríki, India, Miðeystri, Hollandi og Spania, og hevur verið nógv at hoyrt í MTV. Stakfløgan Aicha er seld í fleiri enn 400.000 eintøkum, meðan Guantanao og Walou somuleiðis seldu sera væl kring heimin. Bread And Barrels Of Water varð seld í 250.000 eintøkum. Eisini hava løg verið á savnsfløgum, ið eru seldar í fleiri enn 7 milliónum eintøkum.

Stóra fløgusølan og áhugin fyri bólkinum hevur eisini verið við til at tryggja bólkinum heiðurslønir á bæði Nordic og Danish Music Awards, millum annað besti bólkur úr norðurlondum í 2004.

## Heilt live

Outlandish eru á løtuni á konsertferð kring Danmark. Bólkurin hevur á ferðini Århus bólkin Gypsies við sum konsert tónleikarar. Á hesi konsertferðini hevur Outlandish lagt dent á at spæla heilt live, her eru eingi samples ella forritaði pettir, men livandi tónleikarar, ið spæla livandi tónleik.

Outlandish er góðsku poppur og teirra luttøka á G! ætti tí ikki at tikið nakran av bóli. Tí høg góðska er nakað sum G! Festivalurin ferð eftir ferð hevur lagt dent á, er grunnleggjandi eginleikin, ið teir bólkar, ið festivalurin bjóðar fram, skulu hava.